# Ársfrágreiðing

# 2017

VÁGATUNNILIN

22. mars 2018

# Frágreiðing til aðalfundin 22. mars 2018

**(fyri árið 2017)**

## 1.Nevndin og felagið

Á seinasta aðalfundi 24. mars 2017 vóru allir 4 nevndarlimirnir afturvaldir. Í nevndina vóru afturvald Jens Kári Vilhelm, Dánjal T. Thomsen, Mathea Hilduberg og Marita Hentze. Nevndin skipaði seg við Jens Kára Vilhelm sum formanni og Dánjal T. Thomsen sum næstformanni.

Felagið hevur skrivstovuhølir í leigaðum hølum við bústaði á Hoyvíksvegi 65 í Havn, sum felagið leigar frá P/F Farcod.

Raksturin er skipaður í samstarvi við p/f Norðoyatunnilin, sum nýtir somu hølir, útgerð og starvsfólk. Millumroknað verður í mun til nýtsluna hjá hvørjum felagi sær.

Starvsfólkini hava í 2017 verið 6 í tali umframt stjóran. Við nevndarvirkseminum er samlaða innanhýsis virksemið hjá P/F Vágatunlinum uml. 7 ársverk. Allur tekniskur rakstur er lagdur í uttanhýsis rakstraravtalur.

Umsetningurin var í 2017 16,6 mió. kr. og er hetta 0,4 mió. kr. meira enn fíggjarætlanin, sum varð løgd fyri 2017. Av rakstrinum fóru m.a. 4,9 mió. kr. til rakstur av tunli og vegum, 2,3 mió. kr. til fyrisiting v.m., 0,2 mió. kr. til tryggingar, 0,7 mó. kr. til el, 3,5 mió. kr. til avskrivingar, forútgoldin skattur 1,3 mió. kr. og 11.000 kr. til rentur.

Ársúrslitið gjørdist eitt avlop á 5,9 mió. kr. Avskrivingarnar eru í 2017 broyttar til, at tunnilin framyvir verður avskrivaður lineert yvir 50 ár.

# 2. Virksemið

Endamálið hjá felagnum er smb. viðtøkunum fyri felagið og løgtingslóg um fast samband um Vestmannasund, at útvega fast samband millum Streymoy og Vágoy, hava rakstur av fasta sambandinum um hendi umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.

Sambært §1 í løgtingslóg um fast samband um Vestmannasund stendur:

Rættur til tunnilsgerð og eftirlit:

§ 1. P/F Vágatunnilin, (skr.nr. 2809/1998) fær rætt til vega,- brúgva- og tunnilsgerð millum Streymoynna og Vágarnar um Vestmannasund og ognarrætt til lidna tunnilin við tilhoyrandi brúgvum og vegi.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin skal góðkenna tunnilsverkætlanina, herundir vega,- brúgva- og tunnilsgerðina, áðrenn tunnilsarbeiðið verður sett í verk.
*Stk. 3.* Tá útveganarkostnaðurin er fult afturgoldin, verður alt anleggið, uttan viðurlag, avhendað landinum til ognar.

Í høvuðsheitum hevur arbeiðið fevnt um evnini, ið nærri eru lýst niðanfyri.

## 2.1 Tunnilsarbeiðið

Nógv av vanliga viðlíkahaldinum av tunlinum liggur í føstum skipanum, og tænastusáttmálar eru gjørdir við fleiri fyritøkur um ymiskar tænastur, t.d. viðv. pumpuskipanini, gjaldsstøðini, reingerð av tunlinum, dagligum eftirliti í tunlinum v.m. Vit hava onga fasta avtalu um viðlíkahald av el-innstallatiónunum, men alt arbeiðið verður gjørt eftir áheitan frá tunnilsfelagnum. Hetta viðførir, at alt dagligt eftirlit av el-installatiónunum verður framt av tunnilsfelagnum.

Nakað av teimum hvítu ljósrørunum, sum eru við víkiplássini, vendiplássini og við teknikhúsini eru skift út við LED-ljósrør, tó er ikki heilt liðugt enn. Tað, sum er skift út inntil nú, hevur roynst sera væl, og einki viðlíkahald hevur verið av tí, sum er skift. Komandi ár er ætlanin at skifta restina av teimum hvítu ljósrørunum undir loftinum og at skifta øll ljósini í teimum upplýstu skeltunum til LED.

Tað er uppsett nýggj bilverja (betongblokkar) uttan fyri tunnilsmunnan Vágamegin. Fyrimunirnir við betongblokkunum er, at tað var ikki neyðugt at grava niður í vegøkslini, har tað eru sera nógvir kaðalar, og skuldi seinni verðið neyðugt at grivið á strekkinum, kunnu betongblokkarnir lætt flytast.

Vanliga verða miðlinjurnar á øllum landsvegum málaðar tvær ferðir hvørt ár við onkrari serstakari máling. Í hinum norðanlondunum verður altíð brúkt termoplast máling til alla merking av vegum. Á vári 2017 avgjørdu vit at mála miðlinjuna í Vágatunlinum við termoplasti. Hetta er ein nógv dýrari máling, men hon skuldi hildið í fleiri ár. Royndin hevur víst misjavnt úrslit við tað, at málingin "brestur" av í nógvum støðum.

Í sambandi við at Landsverk hevur skift øll bygda- og vegvísingarskeltini, hava vit eisini valt at skifta øll slík skeltir, sum Vágatunnilin eigur.

Í sambandi við at Landsverk hevur gjørt høvuðseftirlit av øllum teirra brúgvum, blivu brúgvin um Leynará og brúgvin um Markná Vágamegin kannaðar. Eftirlitið vísti, at brúgvarnar er í góðum standi.

Á heysti 2017 byrjaðu vit fyrireikingararbeiðið til at skifta alla ljósskipanina til eina LED ljósskipan, og í hesum sambandinum hava vit vent okkum til SMJ, ráðgevandi verkfrøðingar, fyri at fáa gjørt kanningar av verandi ljósskipan og at gera útbjóðingartilfar til eina nýggja ljósskipan. Hetta arbeiði er í gongd, og arbeiðið verður væntandi bjóðað út áðrenn summarið. Um vit skifta ljósskipan, so er ætlanin, at arbeiðið skal gerast veturin 2018/2019.

Pumpuverkið í Vágatunlinum koyrir sera væl, og tað er lítið viðlíkahald av pumpunum. Vatnnøgdin, sum verður pumpað úr tunlinum, hevur verið støðug, uml. 600 tons um samdøgrið, ella 416 litrar um min., sum er sama nøgd, sum tá tunnilin opnaði.

Frá statusdegnum til í dag eru ikki hendingar, sum vit meta kunnu hava møguliga ávirkan á komandi ársroknskap.

## 2.2 Fígging

Íleggingargrunnurin fyri Føroyar veitir fígging til verkætlanina. Av fíggingini var saldoin á láninum við árslok 2017 0,1 mió. kr. Felagið hevur í 2017 rindað 11.000 kr. í rentu.

Lánisáttmálin sum upprunaliga varð gjørdur við Íleggingargrunnin í 2002, tá tunnilin lat upp fyri almennari ferðslu, skuldi verða afturgoldin tá 15 ár vóru farin. Saldoin á láninum var longu afturgoldin í 2013. Av praktiskum ávum, hava vit gjørt avtalu við Íleggingargrunnin, at vit lata eina lítla upphædd standa eftir, so lánið framhaldandi er aktivt. Um Vágatunnilin í framtíðini skuldi havt tørv á likviditeti, hevur felagið møguleika at søkja um lán hjá Íleggingargrunninum, og verður hetta játtað, kann sama lániskjal nýtast. Við at loysa tað á henda hátt, sparir felagið útreiðslur sum eru bundnar at stovning o.l.

## 2.3 Ferðsla

Í dag eru seks oyggjar knýttar saman við byrgingum, brúgv og undirsjóvartunlum. Sambært hagtølum frá Hagstovuni búðu á hesum oyggjum í 2017 44.130 fólk. Samlaða fólkatalið í Føroyum var 50.437. Sostatt eru 87,5% av íbúgvunum í Føroyum samanbundnir við vegsambandi.

Í talvuni niðanfyri hava vit eisini nevnt ferðafólkatalið, sum fór um flogvøllin. Hesi hava eisini stóran týdning fyri ferðsluna í Vágatunlinum.



Samanbindur 87,5% av íbúgvunum

Fólkatal[1]:

| | |
|---|---|
| Streymoy | 23.765 (47%) |
| Eysturoy | 11.242 (22%) |
| Vágar | 3.210( 6%) |
| Norðoyggjar | 5.913 (12%) |
| Í alt | 44.130 (88%) |
| Aðrar oyggjar | 6.307 (13%) |
| Íalt (2016) | 50.437 |
| Flogvøllurin 2017[2] | 341.388 |

1)Hagstovan
2)FAE.fo

Mynd 1

Á myndini niðanfyri sæst, hvussu ferðslan er deild yvir árið og hvat miðalferðslan hevur verið einstøku mánaðirnar frá 2013 til 2017. Tveir teir fyrstu mánaðirnir í 2018 síggjast eisini.




| | Jan | Feb | Mar | Apr | Mai | Jun | Jul | Aug | Sep | Okt | Nov | Des |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2013 | 1.470 | 1.451 | 1.620 | 1.710 | 1.697 | 1.909 | 2.110 | 1.947 | 1.727 | 1.739 | 1.522 | 1.462 |
| 2014 | 1.568 | 1.586 | 1.683 | 1.833 | 1.963 | 2.157 | 2.268 | 2.040 | 1.826 | 1.783 | 1.664 | 1.522 |
| 2015 | 1.336 | 1.496 | 1.835 | 1.772 | 1.847 | 2.157 | 2.367 | 2.182 | 1.996 | 1.965 | 1.720 | 1.707 |
| 2016 | 1.630 | 1.707 | 1.975 | 1.912 | 2.113 | 2.338 | 2.415 | 2.339 | 2.113 | 2.100 | 1.921 | 1.880 |
| 2017 | 1.835 | 2.002 | 2.087 | 2.325 | 2.452 | 2.642 | 2.845 | 2.674 | 2.466 | 2.297 | 2.018 | 1.946 |
| 2018 | 2.000 | 1.920 | | | | | | | | | | |

Mynd 2. Miðalferðsla pr. dag frá 2013 til 2017 og jan. feb. 2018.




Mynd 3. Ferðslan hevur í 2017 verið í miðal 2.301 bilar/døgn, í mun til 2.037 bilar/døgn árið fyri.

Samlaða ferðslan og %-broyting síðan tunnilin opnaði.

| Ár | Akfør | % broyting |
|---|---|---|
| 2003 | 359.440 | |
| 2004 | 375.958 | 4,6% |
| 2005 | 422.920 | 12,5% |
| 2006 | 524.992 | 24,1% |
| 2007 | 563.188 | 7,3% |
| 2008 | 576.956 | 2,4% |
| 2009 | 585.826 | 1,5% |
| 2010 | 580.750 | -0,9% |
| 2011 | 593.178 | 2,1% |
| 2012 | 594.384 | 0,2% |
| 2013 | 620.072 | 4,3% |
| 2014 | 666.457 | 7,5% |
| 2015 | 681.673 | 2,3% |
| 2016 | 746.070 | 9,5% |
| 2017 | 839.750 | 12,6% |

Mynd 4



Mynd 5. Tal av akførum, sum hava koyrt gjøgnum tunnilin frá 2003 til 2017. Tvey tey seinastu árini áðrenn tunnilin lat upp, vórðu um 100.000 til 110.000 akfør flutt um Vestmannasund við ferju.

## 2.4 Nýtslugjøld og gjaldstøð

Nýtslugjøldini eru støðugt lækkaði síðan tunnilin varð tikin í nýtslu fyri 15 árum síðan. Prísirnir fyri persónbilar eru lækkaðir við millum 47% og 78%. Prísurin fyri staka koyring í des. 2002, tá tunnilin lat upp, var kr. 188,-. Í dag er prísurin kr. 100,-. Prísgongdin síðan tunnilin varð tikin í nýtslu, sæst niðanfyri (mynd6).




Mynd 6: Prísgongdin fyri persónbilar síðan tunnilin lat upp fyri stakar túrar og avsláttarskipan. Stakir túrar eru lækkaðir 47%, hald (20 túrar) lækkaðir 78%.




Mynd 7: Prísir fyri hald til lastvognar, bussar og trailarar síðan tunnilin lat upp. Yvir 12m lækkaðir 88%, og millum 6m og 12m lækkaðir 82%.




Mynd 8: Prísgongdin stakar túrar fyri lastvognar, bussar og trailarar síðan tunnilin lat upp. Yvir 12m lækkaðir 78%, millum 6m og 12m lækkaðir 67%.

Miðalprísurin verður funnin við at deila umsetningin við samlaðu ferðsluna. Á mynd 9 niðanfyri sæst gongdin í miðalprísunum síðan tunnilin lat upp. Í 2017 var miðalprísurin kr. 39,48, svarandi til kr. 19,74 hvønn vegin. Frá 2003 til 2017 er miðalprísurin lækkaður við góð 73%.




Mynd 9. Miðalgjald pr. akfar sum fer framvið gjaldstøðini.

Á myndini niðanfyri er víst index fyri ferðsluna síðani tunnilin lat upp, og hvussu gongdin í miðalgjaldinum fyri hvørt akfar hevur verið (2003 er sett til 100).




Mynd 10. Index fyri umsetning pr. akfar og fyri ferðslu

Gongdin vísur, at samlaða ferðslan síðan byrjan er økt 134%. Miðalprísurin er lækkaður 73%.

Arbeiðið við at betra innkrevjingina og gera hana meiri smidliga og tíðarhóskandi fyri kundarnar, verður arbeitt við allatíðina. Tað at vit broyttu skrásetingina, við at taka myndir av nummarplátunum og sjálvvirkandi skráseta hesar í skipanini, hevur roynst væl.

Gjaldsskipanin er ein felags skipan við P/F Norðoyatunnilin, men er soleiðis háttað, at klárt mark er millum fíggjarligu viðurskiftini hjá feløgunum.

## 2.5 Staktúrar/Hald

Á næstu mynd sæst hvussu teir ymsu akfarsbólkarnir gjalda. Tað eru alt fleiri sum fáa sær hald. Tað eru 93% av teimum sum nýta tunnilin sum hava hald. 20% av bilunum sum nýttu tunnilin høvdu árshald og 68% koyrdu við hald til akfar minni enn 6m ella minni enn 3.500 kg. 5% høvdu hald til stóran bil yvir 6 metur.




Mynd 11. Vísir hvussu prosentbýtið er millum teir umsu gjaldbólkarnar og hvussu stóran %-part hesir bólkar gjalda.

## 2.6 Hvar eru akførini skrásett

Talvan niðanfyri vísir hvar akførini, sum nýta Vágatunnilin, eru skrásett, og hvussu stóran prosentpart hesi gjalda. Dømi: Av teimum sum nýta tunnilin eru 37% skrásett í Vágunum og hesi gjalda 29% av samlaða umsetninginum.




Mynd 12. Vísir í % hvar úr landinum tey sum koyra eru skrásett, og hvussu nógv hesi gjalda.

## 2.7 Heilsa, trygd og umhvørvi

Sum partur av støðuga arbeiðinum við at halda trygdina á einum høgum støði, verður tunnilin støðugt kannaður og hevur hetta ført til eitt ávíst viðlíkahaldsarbeiði. Fyri at darva ferðsluna sum minst og fyri at fasthalda trygdina, er gjørt av, at tá arbeitt verður á vegbreytini, verður tunnilin stongdur og arbeitt verður um náttina. Tó verða bilar leiddir gjøgnum tunnilin annanhvønn tíma.

Eitt krav frá myndugleikunum er, at tilbúgvingarætlan fyriliggur. Tilbúgvingarætlanin er gjørd í samstarvi við allar partar sum kunnu hugsast at verða ein liður í hjálpararbeiðinum, um óhapp er í tunlinum. Tað verði seg sløkkilið, sjúkrahús, løgregla, Landsverk, Brunaumsjón Landsins o.o.

Størri venjingar eru 5. Hvørt ár. Seinasta venjingin var í september 2016.

Tað eru javnan  smærri venjingar sum sløkkiliðini sjálvi taka stig til.

## 2.8 Frí ferðsla

Eins og undanfarin ár vóru ársdagarnir, tá ið ávikavist Vágatunnilin og Norðoyatunnilin lótu upp fyri ferðslu, hátíðarhildnir við at opið varð uttan at nýtslugjald var kravt. Umframt hetta vóru 2 dagar lagdir í samráð við Kunningarstovuna/Handilslívið í Vágum, sum á henda hátt kann nýta høvi at gera vart við seg.

Í 2017 koyrdu 8.708 teir fýra dagarnar frítt var at koyra. Hóast ferðslan stórt sæð er tann sama sum vanligar dagar, so hevur tað framhaldandi verið eitt ynski at fasthalda tunnilsdagarnar. Hetta hava vit eftirlíkað.

## 2.9 Skipan av rakstri

Raksturin hjá felagnum er skipaður við innanhýsis virksemi - sum fevnir um leiðslu felagsins og innkrevjing av nýtslugjaldi, og við uttanhýsis tænastuavtalum, sum fevna um tekniska raksturin av tunlinum og gjaldstøðini.

Avtalað er við P/F Norðoyatunnilin um felags rakstur, útreiðslur verða býttar javnt millum feløgini, tó soleiðis, at serstakar útreiðslur, ið hoyra øðrum felagnum til, verða goldnar av hesum.

# 3. Mál av samfelagsligum týdningi

Verkætlanin er løgd í eitt sjálvstøðugt partafelag, ið hevur endaligu fíggjarligu ábyrgdina.

# 4. Rakstraræltan fyri komandi ár

Høvuðstølini í rakstraræltanini fyri 2018 eru víst niðanfyri.

| **Rakstur** | **mió kr** |
|---|---|
| Umsetningur | 15,1 |
| Rakstur tunnil og vegir | -4,8 |
| Rakstur og fyrisiting | -2,3 |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar og fíggjarpostar** | 8,0 |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | -3,5 |
| Fíggjarpostar | -0,0 |
| **Ársúrslit** | 4,5 |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | 3,5 |
| Íløga ljós | -9,0 |
| **Likviditetsavlop** | -1,0 |

Bert smærri íløgur eru gjørdar í 2017. Støðisognin er við árslok uml. 195,3 mió. kr. Ætlanin er at gera størri ábøtur á ljósskipanina í 2018.

# 5. Niðurstøða

Samanumtikið kann staðfestast:

- Umsetningurin gjørdist heldur betri enn ætlanin.
- Vøkstur í ferðsluni

Tórshavn 22. mars 2018

Jens Kári Vilhelm, formaður

Dánjal T. Thomsen, næstformaður

Mathea Hilduberg, nevndarlimur

Marita Hentze, nevndarlimur

/ Uni Danielsen, stjóri